# ítróttur

Nr. 248 • týsdagur • 28. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Nýggj roknskaparkrøv

Í seinastu útgávuni av FSF-tíðindum verður staðfest, hvørji roknskaparkrøv føroysk fótbóltsfeløg framyvir skulu lúka. Hetta sum partur av teimum krøvum, ið nú verða sett av UEFA.

Hetta verður fyrst og fremst gjørt fyri at tryggja gjøgnumskygni, eins og nýggju treytirnar skulu tryggja javnbjóðis kapping millum feløgini.

At byrja við verður kravt, at feløg skulu lata inn roknskapir, sum eru uppsettir sambært krøvunum í partafelagslógini. Enn eru ikki nýggj krøv komin, men tað er lítið at ivast í, at reglurnar framyvir fara at fevna um krøv til eginpening og rakstrarúrslit, eins og tað helst fer at verða staðfestur ein býtislykil, sum setir eitt mark fyri, hvussu stóran part av inntøkunum feløg kunnu nýta til leikarar og lønir til hesar.

-jm

## Tryggir sigrar

Eftir evstamark til jólablað okkara vórðu tveir dystir leiktir í fremstu flogbóltsdeildunum hjá kvinnum og monnum.

Í báðum førum var talan um dyst millum ÍF og SÍ, og í báðum førum gjørdist úrslitið eisini soleiðis, sum roknast kundi við.

Hjá kvinnunum hevði ÍF ikki stórvegis trupulleikar við at basa mótstøðuni. Enn hevur SÍ einki stig fingið í landskappingini, og tó at tær til tíðir vóru væl við í dystinum hesaferð, so vóru stigini ikki serliga nær.

Hjá monnunum hevur SÍ seinastu vikurnar staðfest, at teir vilja verða heilt frammi í oddinum, og í hesum seinasta dystinum nýttu teir eisini høvið til at staðfesta støðuna.

Uttan stórvegis roks gjørdist talan um tryggan 3-0 sigur, soleiðis at Sørvingarnir nú hava ein lítlan fyrimun, tá farast skal undir endaspælið.

-jm

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 10 | 9 - 1 | 28 | 7 | 21 | 18 |
| 2 TB | 10 | 9 - 1 | 27 | 10 | 17 | 18 |
| 3 Dráttur | 10 | 4 - 6 | 21 | 20 | 1 | 8 |
| 4 ÍF | 10 | 4 - 6 | 14 | 18 | -4 | 8 |
| 5 KÍF | 10 | 4 - 6 | 13 | 21 | -8 | 8 |
| 6 SÍ | 10 | 0 - 10 | 3 | 30 | -27 | 0 |

### Meistaradeild, menn

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 8 | 7 - 1 | 22 | 7 | 15 | 14 |
| 2 Mjølnir | 8 | 6 - 2 | 20 | 10 | 10 | 12 |
| 3 Fleyr | 8 | 5 - 3 | 18 | 12 | 6 | 10 |
| 4 Fram | 8 | 1 - 7 | 7 | 22 | -15 | 2 |
| 5 ÍF | 8 | 1 - 7 | 6 | 22 | -16 | 2 |

# Landsstýrið umhugsar at senda neyðhjálp

**Jóannes Eidesgaard løgmaður umhugsar í løtuni, um Føroyar eiga at luttaka í neyðhjálpararbeiðinum eftir ræðuligu vanlukkuna í Indiska Havinum, sum higartil hevur kravt um 23.000 mannalív. Landsstýrið verður kallað saman, og um Føroyar senda pening, skal ein eykajáttanarlóg fyrst samtykkjast í fíggjarnevndini**

NEYÐHJÁLP

*Heini í Skorini*
*Heini_skorini@yahoo.com*



*Mynd: Løgmaður fer at kalla landsstýrið saman og viðgera, um og í hvønn mun Føroyar skulu luttaka í neyðhjálpararbeiðinum í Suðurasia, har jarðskjálvti higartil hevur kravt um 23.000 mannalív*

Jólini hava ikki verið eins idyllisk og hugnalig fyri øll. Sum flestum kunnugt hevur ein jarðskjálvti higartil kravt yvir 23.000 mannalív í londunum kring Indiska Havið, og kring heimin verður støða nú tikin til, í hvønn mun neyðhjálp skal verða veitt.

### Einki ítøkiligt

Jóannes Eidesgaard løgmaður situr eisini í hesum døgum og umhugsar, um føroyska stjórnin skal gerast partur av neyðhjálpini til hart raktu londini kring Indiska Havið. Men hann leggur dent á, at støðan er nýggj, og tí hevur hann ikki havt samband við landsstýrið og fíggjarnevndina.

– Ætlanin er at taka støðuna til viðgerðar í landsstýrinum, men eg kann ikki siga í núverandi løtu, at neyðhjálp heilt víst verður send, tí eg havi ikki ráðført meg við neyðugu persónarnar, sigur ein varin Jóannes Eidesgaard. Politiska arbeiðið liggur í stóran mun stilt undir høgtíðini, og tí skal løgmaður fyrst fáa fólk til arbeiðis og kalla saman til fundar, áðrenn nakað kann gerast.

– Men um vit velja at engagera okkum í neyðhjálpini, hevur tað skund, og so eru ikki stundir at kjakast aftur og fram. Vanliga verður Fíggjarnevndin eisini kalla saman, og so verður ein eykajáttan samtykt í skundi, sigur løgmaður. Ovasti myndugleiki landsins hevur ikki heimildir til sjálvur at taka nøkur stig, og tí skal ein møgulig eykajáttan ígjøgnum fíggjarnevndina og løgtingið.

– Tí kann eg ikki siga nakað ítøkiligt, áðrenn eg havi havt samband við myndugleikan á økinum, slær løgmaður fast.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at Føroyar fyrr hava sent neyðhjálp í skundi, tá neyðstødd lond hava havt tørv á bráðfeingishjálp. Føroyska stjórnin hevur fyrr sent um eina millión til bæði Kosovo og Afghanistan, men løgmaður vil ikki siga nakað um møguligar upphæddir.

– Vanlukkan er júst hend, eingin hevur verið til arbeiðis í landsstýrinum um jólini, og tí er ov tíðliga at siga, um og í hvønn mun vit kunnu veita neyðhjálp, men eg eri sinnaður at taka støðuna til viðgerðar skjótast gjørligt, sigur Jóannes Eidesgaard.

### ST-áheitan

Kring heimin eru tiltøk longu farin í gongd at hjálpa til eftir ræðuleikarnar í India, Indonesia, Sri Lanka, Teilandi, Maldivunum, Bangladesh, Nyanmor og Kenya. ST heitir á "massivan altjóðan stuðul", og pávin í Róm hevur verið frammi við somu áheitan. Úr rúgvuni kann nevnast, at ES-kommisiónin hevur játtað 22 milliónir krónur til neyðhjálpina í Suðurasia, danski Reyði Krossur hevur játtað 200.000 krónur, altjóða Reyði Krossur hevur játtað 500.000 krónur, og hópin av læknahjálp er send av avstað ymsastaðni frá.

Løgmaður og landsstýrið skulu nú taka støðu til, um Føroyar skulu luttaka í neyðhjálpini.